gult cyan magenta svart

DAGSINS MEINING

Búskaparligi veruleikin

Ta› var harmuligt, at danski parturin av pressufundinum ni›ri á Christiansborg í seinastu viku ikki var sendur í SVF, tí føroysku fjølmi›larnir høvdu hug at lata samgonguna sleppa í so lætt rundanum spurningin um búskaparligu skiftistí›ina ella vóru ikki nóg gó›ar stundir til tess.

Løgi›, at eitt álvarsmál sum búskapur Føroya ver›ur vi›gjørt so líti›, tá samanbori› ver›ur vi› veruleikafjaru svørt hvítu definitiónirnar vi›víkjandi tjó›, ikki tjó›, evsta vald, o.s.fr. Ta› er neyvan nakar, i› tr‡r uppá eina skiftstí› uppá longur enn f‡ra ár. Føroyingar eru ivaleyst heldur ikki so ósmædnir, at teir koma sær at føra seg fram uppá annans rokning í eini fimtan til tjúgu ár, sum samgongan ætla›i ta›.

Vit síggja, at hóast búskapurin er rættiliga heitur, og landskassans inntøkur methøgar, so hava ambulansurnar ein ke›iligan tendens til at ste›ga upp og bussarnir ein ikki minni ke›iligan tendens til at missa hjólini — tankavekjandi eftirsum tí›irnar ikki altí› fara at vera so gó›ar sum í dag.

Eitt stig á lei›ini til búskaparligt sjálvbjargni, um man tr‡r uppá fullveldi ella ei, er ein endursko›an av landskassans útrei›slum, serliga sæ› í ljósinum av knappari hálvaa›rari milliard í blokkstu›uli og ø›rum veitingum um ári›.

Vit hava mangan eftirl‡st einari endursko›an av Finn Norman Christensen bygna›inum. Um ein samanber kostna›in av mi›fyristingini í dag og kostna›in í 1993, so eru sera stórar millióna-upphæddir á muni. Merkir borgarin eina betri tænastu? Fáa landsst‡rismenn betri rá›geving? Ein freistast til at siga tvørturímóti. Vit liva í einari tí›, har man tosar um, at landi› skal gera almenn partafeløg, borgarin skal gjalda bummpengar fyri at koyra á landsvegum, pensiónsskipanin skal gjaldast individuelt. Hvar skulu so okkara skattapengar fara, um ikki til eitt samhaldsfast samfelag? Ivasamt er, um vit hava rá› til FNC bygna›in sum er, og hva›na verri ver›ur um fullveldi› gerst veruleiki.

Tey, i› vænta at síggja uttanríkis- og løgmálará› ver›a bygt uppí mi›fyrisitingina tá fullveldi› Føroyar gerst veruleiki, fáa eina a›ra bók at lesa í, tá tann fyribils suspendera›a búskaparliga tyngdarkraftin aftur setur inn í føroyskum politikki og føroyskari umsiting.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Til minnis um gummu, Ingibjørg Poulsen

Ta› vóru tung bo› at fáa umbor›, og ta› tók eina løtu at fata ta›, tá Erla hev›i sagt: »Gumma er farin«. Ta› tyktist enn meira óveruligt, tá eg seinni sat á kamari mínum og skuldi seta or› á, hvør gumma var. Ta› var so torført vi› fáum or›um.

Gumma var barnavinur. Hon var, minnist meg rætt, gumma Súsonnu systi, Magnus, Ey›un, Súsonnu (hjá Bjarna og Kammu) og Biritu, – men millum okkum systkinabørn var hon »Gumma«. Vit áttu hana øll. Hvør minnist ikki tær hugnaligu løturnar yviri hjá gummu og Jóan Jakku; ta› var sum at koma í fø›ingardag hvørja fer›. Gumma, tú elska›i okkum, og vit teg! Tú var altí› í okkara parti, eisini tá vit ikki vóru børn longur. Tá vit so sjálv fingu børn, føldu tey seg líka vælkomnan Oman Stóraga›.

Gumma, tú kundi eisini siga tína meining, og øll vistu, hvar tey høvdu teg, – eingin ivi um ta›! Eitt anna›, sum ey›kendi teg, var títt heita hjartalag og trúfesti. Røsk var tú eisini. Tú gavst ikki so, sjálvt um tú var nógv plága› av vánaligum beinum tey sí›stu nógvu árini. Hanagleivi› frá mammu og ni›an til Julionnu var nú til seinast eitt stórt tak, men ni›an komst tú.

At tú var trúføst, kunnu øll tey, sum hava havt naka› vi› Havnar Ró›rarfelag at gera, bert taka undir vi›. Ta› gekk næstan ikki vika, at tit, Jóan Jakku og tú, ikki vaska›u, baka›u ella góvu eina hjálpandi hond vi› einum ella ø›rum. Tú bleiv gla› og rørd, tá tú, fult uppibori›, gjørdist hei›urslimur í Havnar Ró›rarfelag.

Gó›i Jóan Jakku. Or› røkka ikki í løtum sum hesum. Má Hann, i› øllum valdar, styrkja og hjálpa tær og øllum okkum, sum stó›u gummu nær, gjøgnum hesa sváru tí›.

Til gummu

Gó›a gumma, á fer› skalt tú burtur
har onganti› nátt er,
har ei følna urtir.
Tú fjálga›i altí›, tá lívi› var kalt.
Vit elska og minnast teg.
Takk fyri alt.

Hvíl í fri›i.

Eyvind

Takk

Øllum, sum á ymsan hátt gleddu meg á 80 ára degnum, takki eg hjartaliga og sendi mínar vinarligastu heilsanir og gó›ynski.

Johs. Andr. Næs

---

†

Kunngjørt ver›ur fyri ætt og vinum, at kæri bró›ir okkara

ELLENDUR DEBES
Tórshavn

anda›ist í heiminum 50 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 17.00.

Jar›arfer›in ver›ur úr Kirkjugar›skapellinum hósdagin kl. 13.00.

Systkini

---

†

Kunngjørt ver›ur fyri ætt og vinum, at gó›i ma›ur, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

ELI BÆRENTSEN
ætta›ur úr Hvalba

anda›ist í heiminum 29. oktober, 90 ára gamal.

Jar›arfer›in ver›ur úr Tårnby Kirke, 2770 Kastrup, hósdagin 2. november.

Fyri tey avvar›andi
Eva og Majken

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysingar@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Ni›ur til samrá›ingar

Í hesum døgum er ta› gerandiskostur at hoyra um fólk, i› skulu ni›ur til samrá›ingar. Ein teirra, i› eisini telist í fylginum av samrá›ingarfólkum, er Tróndur Patursson, men ørindi hansara eru av meira listarligum slag og t‡sdagin tekur hann lei›ina til Danmarkar

LIST
Dagfinn Olsen
Mynd: Jens K. Vang

Í leygardagsbla›num skriva›u vit um Trónd Patursson, sum spentur bí›a›i eftir bo›um vi›víkjandi lagnuni hjá uppskotum um listarverk úti í heimi. Eittnú er talan um kirkju í New Castle og so eisini floghavnin í Kastrup.

Tróndur er millum teirra, i› møguliga skal pr‡›a n‡ggju farstø›ina í Kastrup og hann hevur lati› uppskot inn. Bo› skuldu so koma um vikuskifti›, hvør lagnan var› hjá uppskotum hansara.

Tróndur hevur enn ikki fingi› endalig bo› frá listarrá›num, i› tekur avger› um pr‡›ingina. Men t‡sdagin tekur hann lei›ina til Danmarkar, tí bo› eru send eftir honum um at koma til samrá›ingar vi›víkjandi møguligum pr‡›ingarætlanum.

Tróndur hev›i ætlanir um sítt kenda kosmiska rúm og eina komposition vi› glasfuglum.

Listará›i› hevur veri› heldur ivasamt vi›víkjandi rúminum, tí mett ver›ur, at ta› er ikki stimbrandi fyri fólk vi› hæddarræ›slu, og so er ta› ikki hóskandi í eini floghavn.

– Men møguliga skal ætlanin b‡tast í tvey, so talan ver›ur kanska um fuglarnar, sigur Tróndur, i› ikki væntar, at naka› ver›ur av kosmiska rúminum, men fugarnir úr glasi eru so ikki afturvístir enn. Samrá›ast skal um teir í komandi viku.

Til T‡sklands

Tróndur Patursson liggur ikki á løtu sí›uni. Umframt at skula samrá›ast í Kastrup, so skal hann ví›ari til T‡sklands, har hann skal seta eina frams‡ning upp. Hetta er glaslist og málningar og s‡nt ver›ur fram á Nordisk Institut í Flensburg.

Tróndur hevur í ár havt 7 frams‡ningar og ári› hevur veri› merkt av nógvari fer›ing. Hann hevur m.a. veri› í Caribia, Íslandi, Noreg, T‡skalndi og í París, so Tróndur hevur veri› ov líti› heima, um hann sjálvur skal meta um. Men hann hevur sett ári› av til frams‡ningar, so hann væntar at ver›a meira heima næsta ár.

Tróndur hevur eisini gjørt glas til eina kirkju í Odense í ár.

Tróndur er fegin um, at hann er fast kn‡ttur at einum glasverksta› í Keypmannahavn, i› hevur samband vi› nógvar byggifrø›ingar og sum so roynir at finna hóskandi listarfólk til ávisar byggiætlanir.

Um frams‡ningarnar sigur Tróndur, at ta› hevur ikki gingi› so væl vi› málningunum, men hann leggur skemtandi afturat:

– Ingálvur av Reyni seg›i, at um ein ikki selur, so er ein kanska á gó›ari lei›, og ta› má eg eisini siga, sigur Tróndur, sum tó kann fegnast um, at betur hevur gingist vi› glaslistini.